# Ársfrágreiðing 2009-2010

# Frágreiðing um virksemi stovnsins og gongdina á fjarskiftismarknaðinum

November 2010

Telecommunication Authority, Skálatrøð 20, P. O. Box 73, FO 110 Tórshavn, Tel +298 35 60 20, Fax +298 35 60 35, www.fjarskiftiseftirlitid.fo

1. Fororð ..... 3

2. Fjarskiftiseftirlitið ..... 5

2.1. Stovnurin Fjarskiftiseftirlitið ..... 5
2.2. Fíggjarviðurskifti ..... 5

3. At veita konsessión ..... 6

3.1. Konsessiónir (fjarskiftisloyvi) veittar sbrt. fjarskiftislógini § 8 ..... 6

4. Fjarskiftisveitingar og marknaðarstøðan ..... 7

4.1. Breiðband og internet ..... 7
4.2. Fastnet- og IP-telefoni ..... 8
4.3. Fartelefoni ..... 8
4.4. Fylgisveinatænastur ..... 9
4.5. Sjóøkið ..... 9
4.6. Kringvarpsvirksemi o.a. ..... 9
4.7. ÚF/SVF sendinetini (Kringvarp Føroya) ..... 10
4.8. Uttanlandssamskiftistøknir ..... 10

5. Treytir og meginreglur ..... 11

5.1. Sambinding og samskipan av fjarskiftiskervum og fjarskiftistænastum ..... 11
5.2. Prísásetingarmeginreglur ..... 11
5.3. Veitingarskyldan hjá Føroya Tele ..... 12
5.4. Tilbúgvingarviðurskifti ..... 12

6. Nummarviðurskifti ..... 13

7. Radioeftirlitsvirksemi – tilluting av frekvensum (tíddum), radioprógvum o.a. ..... 13

8. Altjóða og millumtjóða viðurskifti ..... 14

## 1. Fororð

Vælvirkandi fjarskiftismarknaðir hava avgerandi leiklut fyri menning og búskaparligum vøkstri í einum landi bæði við nútíðini og framtíðini í huga. Henda týdningarmikla vinnugrein bjóðar samskiftishættir, ið verða nýttir av næstan øllum borgarum og fyritøkum, og vit hava møguleika at samskifta við allan heimin óheft av tíð ella stað.

Føroyar hava longu í nøkur ár verið eitt av fremstu londum í heiminum innan breiðbandsdekning við einum dekningi upp á knøpp 100%; tað eru heilt fá búpláss eftir, ið ikki hava møguleika at samskifta umvegis breiðbandið, og fæstu føroyingar kunnu í dag ímynda sær ikki at hava atgongd til breiðband.

Útbreiðslan av breiðbandi í Føroyum er so høg, at hon neyvan kann gerast nógv hægri í mun til fólkatalið. Í 2009 og 2010 er talið av breiðbandshaldum økt við gott 1.300 haldum og var við hálvárslok 2010 komið upp á 16.231. Eisini er stór broyting í ferðini av haldunum, soleiðis at góð 80% av haldunum nú eru 2Mbit/s ella yvir. Fyri tveimum árum síðani, við hálvárslok 2008, var sama talið einans 12%. Útbreiðslan av tænastan við uppringdum internetið er nú so lág, at tað er spurningur um heilt stutta tíð, til hon heldur uppat.

Nýtslan av fartelefon økist framvegis, og fartelefonin hevur umráðandi leiklut í samfelagnum innan ymisk øki, eitt nú til kunning av ymiskum slag.

Í árunum aftaná bygnaðarbýtið á Føroya Tele, har meginparturin av tænastuvirkseminum varð lagt í P/F FT Samskifti og kervisvirksemið í P/F FT Net, snúði kjakið kring felagið seg serliga um einskiljingartilgongdina. Men frá februar 2008, tvs. við undanfarnu og núverandi samgongu hevur onki politiskt útspæl verið um ætlanir um einskiljing.



Nú nøkur ár eru liðin síðan uppbýtið av Føroya Tele tykist at føroyski fjarskiftismarknaðurin er á einum vegamóti. Fjarskiftiseftirlitið metir, at tørvur er á at endurskoðað hvørt verandi bygnaður í samtakinum P/F Telefonverkið er tann best hóskandi. Neyðugt er at viðgera spurningin hvørt tað framvegis er best hóskandi, at netparturin skal liggja í einum felagið tengt at móðurfelagnum. Hóast talan er um ymisk feløg, eru feløgini tætt samanknýtt. Tað er persónssamfall í leiðslu og nevnd í flestu feløgum í samtakinum, umframt at ávísar funktiónir, t.d. fíggjardeildin eru felags, tvs. at raksturin í øllum feløgum í samtakinum verður umsitin í somu deild. Fjarskiftiseftirlitið metir, at tætta samknýti ímillum feløgini ger tað trupult at hava vatntætt skott ímillum virksemi hjá feløgunum í samtakinum. Fjarskiftisveitarar, ið eru í kapping við Føroya Tele, hava eisini ferð eftir ferð víst á, at Føroya Tele hevur ein kappingarfyrimun og at kappingin verður gruggað orsakað av at netparturin er so nær tengdur at samtakinum.

Støðan á føroyska fjarskiftismarknaðinum hevur síðstu árini staðið meira ella minni í stað. Ikki at skilja at ongin menning er í fjarskiftistænastunum; tað er t.d. hend stór tøknilig menning innan breiðbandsveitingar og útbygging av 3G tøknini, bara fyri at nevna nøkur dømir. Hinvegin er tað kanska serliga á kappingarpartinum at stíður er komin í. Stóru kappingarneytarnir innan fjarskiftistænastur, FT Samskifti og Vodafone, hava síðstu árini havt meir ella minni somu marknaðarpartar innan ávísu tænastuveitingarnar. Tað letur ikki til at veitararnir sjálvir gera munandi átøk, ið kunnu førka hesa støðu.

Eitt av høvuðsatlitunum framyvir má eisini vera, at føroyski fjarskiftismarknaðurin til eina og hvørja tíð hevur kappingarførar og dagførdar kervistænastur, sum allir veitarar hava javnbjóðis atgongd til, fyri sostatt at hava møguleika at veita endabrúkarunum eitt breitt og fjølbroytt útboð av fjarskiftistænastum til kappingarførar prísir.

Støddin á føroyska fjarskiftismarknaðinum setur mørk fyri hvussu nógvar veitarar, pláss er til í Føroyum. Við hesum verður mett, at ein vælvirkandi kapping neyvan fæst við mongdarkapping, hvørki á netpartinum ella tænastupartinum. Mett verður, at framhaldandi er neyðugt at sett verður inn við átøkum, ið kunnu stimbra kappingina á fjarskiftisøkinum. Galdandi føroyska fjarskiftislóg frá 1997 hevur

sannlíkt troytt sínar høvuðsmøguleikar til at fremja kapping við atliti til at veita konsessión til fleiri fjarskiftisveitarar. Fjarskiftiseftirlitið metir, at meiri hóskandi er, at fjarskiftisregulering hevur tíðarhóskandi heimildir, ið kunnu verja ímóti at kappingarmøguleikarnir og liberaliseringin gera afturstig, og at verja at møguleikin fyri skeivum býti á fjarskiftismarknaðinum kann misnýtast til skaða fyri kappingina og endabrúkararnar.

Sannlíkt er, at kapping á fjarskiftisøkinum framyvir nokk serliga verður skapt við tøkniligari menning og broytingum í tøknini. Alt týðir uppá, at tað einans er hugflogið, ið setir mørk fyri hesi menning, ið er tað mest umráðandi kappingarliga atlitið á fjarskiftismarknaðum ídag. Regulering má ikki verða ein forðing fyri hesi menning, men skal verða við at fremja menningina.

*Jógvan Thomsen*
*stjóri*

## 2. Fjarskiftiseftirlitið

Fjarskiftiseftirlitið (hereftir stytt FSE) er stovnur undir Vinnumálaráðnum. Fjarskiftiseftirlitið umsitur løgtingslóg nr. 79 frá 23. mai 1997 um fjarskifti, við seinni broyting í Ll. nr. 176 frá 21. desember 2001 (fjarskiftislógin).

Endamálið við fjarskiftislógini er sbrt. § 1 í lógini at fremja:

a. at fjarskiftistørvurin í Føroyum verður nøktaður og eina skilagóða nýtslu av tilfeinginum,
b. at javngóð fjarskiftistænasta verður veitt um alt landið til somu treytir
c. tøkniliga góðsku og trygd,
d. ótálmaða atgongd til almenn fjarskiftiskervi og almenna fjarskiftistænastu
e. samskipan av fjarskiftiskervi og fjarskiftistænastu
f. at fjarskiftistænasta verður lagað eftir tørvi
g. at áhugamál brúkaranna verða havd í huga,
h. persónsvernd
i. at skapa fortreytir fyri frælsari kapping á fjarskiftisøkinum

### *2.1. Stovnurin Fjarskiftiseftirlitið*

Fjarskiftiseftirlitið er skipað sum stovnur saman við:

| | |
|---|---|
| 1. Kappingareftirlitinum | www.kapping.fo |
| 2. Posteftirlitinum | www.posteftirlitid.fo |
| 3. Tryggingareftirlitinum, | www.tryggingareftirlitid.fo |
| 4. Elveitingareftirlitinum | www.elveitingareftirlitid.fo |
| 5. Skráseting Føroya | www.skraseting.fo |



Á Fjarskiftiseftirlitinum eru hesi starvsfólk:

| Starvsheitir | Útbúgving |
|---|---|
| 1. Stjóri | M.Sc. E.E, B.Com. |
| 2. Ráðgevi/fulltrúi (parttíð) | Løgfrøðingur-cand merc |
| 3. Samskipari á radioøkinum | Verkfrøðingur |
| 4. Eftirlitsmaður á radioøkinum | Vaktoffiserur og fjarritari |
| 5. Bókhaldari | Skrivstovuútbúgving |
| 6. Journalleiðari | Skrivstovuútbúgving |
| 7. Skrivstovufólk | Skrivstovuútbúgving |

Stjórin, bókhaldari, samskipari og skrivstovufólki eru felags fyri teir 5 stovnarnar. Fulltrúi/ráðgevin er felags á serliga fjarskiftis- , post og kappingarøkinum,

### *2.2. Fíggjarviðurskifti*

Fjarskiftiseftirlitið er á fíggjarlógini undir grein 6.38.3.17. Fjarskiftiseftirlitið (Rakstrarjáttan). Virksemið hjá Fjarskiftiseftirlitinum verður fíggjað við rakstrargjaldi og eftirlitsgjøldum.

Fjarskiftisveitarar rinda rakstrargjald (konsessiónsgjald) í mun til teirra marknaðarpart av føroyska fjarskiftismarknaðinum, og umsitingin av Radioeftirlitsdeildini verður fíggjað við frekvens(tíddar)- og avgreiðslugjøldum.

## 3. At veita konsessión

Sambært fjarskiftislógini eru tveir hættir at veita atgongd til at veita fjarskiftistænastur í Føroyum.

1. Tann eini er at veita konsessión til fjarskifti (fjarskiftisloyvi) sbrt. § 8 í fjarskiftislógini.
2. Hin er, at landsstýrismaðurin kann taka avgerð um, at ávís øki sleppa undan einkarrættinum, t.e. frælsgering sbrt. § 7 í fjarskiftislógini.

Politikkurin higartil hevur verið ein sonevndur ”open-door first come – first served politikkur” (opnar dyr – fyrri var fyrri fær). Er einans hátturin at vita konsessión við heimild í § 8, ið hevur verið nýttur í Føroyum. Í roynd og veru hevði tað ikki verið so stórur munur, um landsstýrismaðurin valdi at nýta heimildina í § 7, har øki vórðu frælsgjørd og samstundis vórðu orðaðar reglur í kunngerð um prísáseting, samflutning o.ø. Hesi viðurskifti eru í dag ásett í konsessiónini.

### *3.1. Konsessiónir (fjarskiftisloyvi) veittar sbrt. fjarskiftislógini § 8*

Fjarskiftiseftirlitið tekur ímóti og viðger umsóknir um konsessión. Í sambandi við umsókn um konsessión eru 5 kravfestingar, alt eftir hvørja konsessión søkt verður um. Konsessiónirnar eru deildar í hesi stig:

- Konsessión á 1. stigi – kringvarpsvirksemi
- Konsessión á 2. stigi - ætlað eigarafeløgum o.tíl.
- Konsessión á 3. stigi - internet- og aðrar samskiftistænastur
- Konsessión á 4. stigi - vanliga 3. stig, íroknað telefonstøðir
- Konsessión á 5. stigi - vanliga 3. og 4. stig, umframt fartelefonikervi og –tænastur

Fjarskiftiseftirlitið viðger fyrst eina umsókn um konsessión, síðan verður tilmæli latið landsstýrismanninum í samskiftismálum, ið tekur endaliga støðu.

Higartil eru hesar konsessiónir veittar av landsstýrismanninum sbrt. § 8 í fjarskiftislógini:

Konsessión á 1. stigi
(kringvarpsvirksemi)

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Sp/f R2-NET (útvarp og sjónvarp) | (fyrr Rás2) |
| 2. | Sjálvsognarstovnurin Lindin (útvarp) | www.lindin.fo |
| 3. | Suðurrás (útvarp) (óvirkin) | www.sudurras.fo |
| 4. | Sp/f Camelot (sjónvarp) (óvirkin) | |
| 5. | P/F Miðlavarpið (óvirkin) | www.sosialurin.fo |
| 6. | Kringvarp Føroya | www.kringvarp.fo |

Konsessión á 2. stigi (eigarafeløg o.tíl.)
(Konsessión til at reka og veita avmarkaða fjarskiftistænastu og fjarskiftiskervi í avmarkaðum øki (kaðal- og loftborið sendikervi), kringvarpskervi, (hybridnet), internettænastu).

1. Eigarafelagið Millum Gilja / Oman flat
2. Eigarafelagið Inni á Gøtu
3. Eigarafelagið Norðasta Horn
4. Eigarafelagið Lítla Gil/Eystan Løgmannabreyt
5. Eigarafelagið Undir Brúnni
6. Rás Gjógv

Konsessión á 3. stigi
(Konsessión til innanlands telefonitænastur - leigulinjur innanlands, tekst- og dátu-samskiftistænastur, fylgisveinatænastur og aðrar virðisskapandi tænastur, íroknað internettænastur men ikki telefonstøðir).

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Farodane (óvirkin) | www.farodane.fo |
| 2. | Formula.fo (óvirkin) | www.formula.fo |
| 3. | Atlantic Online | www.atlanticonline.com |
| 4. | Televarpið | www.televarp.fo |
| 5. | Auxilior (óvirkin) | www.auxilior.com |
| 6. | Farið Hf. | www.farice.fo |
| 7. | SHEFA-2 | www.shefa.fo |
| 8. | P/F Elektron | www.elektron.fo |
| 9. | Fa. Opus | www.opus.fo |
| 10. | Fa. Nótin | www.notin.fo |
| 11. | Sp/f Transform | |
| 12. | Fa. Glotti | |

Konsessión á 4. stigi
(vanliga 3. stig og íroknað telefonstøðir)

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Teletænastuni (óvirkin) | www.teleserve.fo |
| 2. | Teletech (MET) | www.teletech.fo |

Konsessión á 5. stigi

(3. stig, 4. stig + møguliga 1. stig, umframt fartelefonikervi og tænastur)

| | | |
|---|---|---|
| 1. | P/F Telefonverkið (FT Samskifti og FT Net) | www.tele.fo www.ftnet.fo |
| 2. | Vodafone | www.vodafone.fo |
| 3. | Edge Mobile (dóttirfelag hjá 42Telecom.) | www.42tele.com |

## 4. Fjarskiftisveitingar og marknaðarstøðan

### *4.1. Breiðband og internet*

Føroyar eru eitt av fremstu londunum í heiminum innan breiðbandsdekning. Longu í 2007 var dekningurin av ADSL[1] breiðbandi uml. 99,8 %. Tað vil siga, at nærum øll hava møguleika at keypa breiðsbandstænastur.

Útbreiðslan av breiðbandi í mun til fólkatalið er eisini sera stór í Føroyum. Vøksturin í útbreiðsluni er ikki eins stórur, sum fyri uml. 3 árum síðani, men eisini í 2009 og 2010 er talið av breiðsbandshaldum vaksi. Við hálvárslok 2010 var talið á breiðbandshaldum komið upp á 16.200. Hetta er ein vøkstur á góð 9 % í mun til árslok 2008. At útbreiðslan er sera stór, sæst eisini aftur við at mett verður, at tað eru uml. 17.550 húskir í Føroyum[2]

Samstundis sum útbreiðslan av breiðbandshaldum er vaksin tey síðstu árini, er talið av uppringdum internethaldum minkað tilsvarandi. Við hálvárslok 2010 vóru einans 114 hald við uppringdum interneti

[1] ADSL - Asymmetric Digital Subscriber Line
[2] http://www.posta.fo/Files/Billeder/Posta.fo/Tak%20Niður/Tal%20av%20húskjum%202010.pdf

skrásett. Í 2005 vóru uml. 9.000 hald við uppringdum interneti. Tað er einans hjá Føroya Tele at hesi hald framvegis eru. Tað er ein spurningur um stutta tíð til henda tænasta heldur heilt uppat.

Príslegan á breiðbandshaldum í Føroyum hevur síðstu árini verið á einum støði, har flestu húsarhald eru før fyri at gjalda bíligasta haldið. Breiðbandshaldini eru nógv broytt síðsta árið, soleiðis at veitararnir bjóða út breiðbandshald har brúkarin nú, fyri sama prís, fær størri ferð. Millum annað er ein vøkstur á 130% á haldum við ferð 2 Mbit/s frá árslok 2008 til hálvárslok 2010. Føroyski brúkarin samber ofta vørur og tænastur í Føroyum við vørur og tænastur í Danmark, og her kann staðfestast, at prísurin á breiðbandshaldum til privatkundar í Føroyum er munandi hægri enn í Danmark.

### *4.2. Fastnet- og IP-telefoni*

Talið av siðbundnum fastnethaldum er spakuliga minkandi. Hinvegin er nýtslan av fastnetinum minkað munandi meira. Við tað at so nógvir føroyingar hava breiðbandshald, stendur fólki í boði at samskifta umvegis internetið, t.d. umvegis Skype og aðrar miðlar, kanska serliga á sosialum heimasíðunum so sum Facebook, ið rættuliga hevur tikið dik á seg seinastu tvey árini.

Útbreiðslan av IP-telefoni á føroyska marknaðinum letur til at hava trupult at sláa ígjøgnum. Tað hava verið smærri veitarar, ið hava roynt seg við at bjóða út IP-telefoni tænastur til privat kundar. Virksemið hjá øðrum teirra, iConcept var yvirtikið av Føroya Tele á várið 2009, og virksemið hjá hinum, Teletech, letur eisini til at hava trupul kor. Føroya Tele hevur ikki hildið fram við at bjóða somu tænastur, sum iConcept bjóðaði. Hetta sæst m.a. aftur í, at haldini á IP-telefoni eru minkað niður í helvt frá árslokið 2008 til hálvárslok 2010.

Føroya Tele bjóðar tó vinnukundum IP-telefoni skipanir. Nýggja tænastan frá Føroya Tele hevur økt munandi um samlaðu ferðsluna innan IP-telefoni.



Sum heild er góðskan á IP-telefoni samskifti ikki á sama støði sum samskifti umvegis vanligt fastnet, men alsamt vaksandi bandbreiddin bæði innan- og uttanlands bøtir støðugt um hetta. Í IP-telefoni tænastuni frá Føroya Tele er góðskutrygging á breiðbandshaldinum, soleiðis at góðskan á samrøðum ikki verður ávirkað av øðrum virksemi á breiðbandsnetinum.

Ein onnur orsøk til at ferðslan innan fastnet minkar er uttan iva, at ferðslan innan fartelefoni er vaksin nógv síðstu árini.

### *4.3. Fartelefoni*

Tveir veitarar eru á fartelefonimarknaðinum. Føroya Tele, ið hevur landsdekkandi kervi og Vodafone, ið eisini hevur egið kervi, sum røkkur størsta partin av landinum. Vodafone hevur eina innanlands reikingaravtalu við Føroya Tele fyri tey øki í landinum, har Vodafone ikki røkkur.

Bæði Vodafone og Føroya Tele bjóða nú tænastur við 3G[3] tøkni. 3G dekningurin er nøkulunda í somu økjum hjá báðum feløgum, t.e. í Tórshavn, við Skálafjørðin[4], í Klaksvík og á økinum kring flogvøllin í Vágum. Í byrjanini dekkaði tænastan bert Tórshavn. Útboðið við 3G tøkni sæst eisini aftur í GPRS[5]

[3] 3G er stytting fyri 3. generatión av fartelefonum og fartelefoni. Í mun til gomlu tøknina ber 3G í sær, at bæði talu- og dátuflutningur fáa hægri ferð og góðsku.

[4] Bert Føroya Tele, men Vodafone Gøtugjógv, Syðrugøtu og Norðagøtu.

[5] GPRS merkir "General Packet Radio Service" og er ein háttur at senda og móttaka dátuflutning umvegis fartelefonina. Við GPRS ber til at røkka internetinum umvegis fartelefonina.

dátuflutninginum. Við árslok 2008 var talan um samlað 267.763 Mbit up/download í mun til 2.293.226 Mbit up/download við hálvárslok 2010. Talan er sostatt um ein vøkstur á
750 %. Tað er serliga í fyrra hálvári 2010, at størsti vøksturin hevur verið.

Tað eru ikki eins týðiligur vøkstur innan fartelefoni síðsta árið, sum tað var undanfarin ár. Við hálvárslok 2010 var samlaða talið av fartelefoni haldum 57.625; hetta er ein vøkstur upp á uml. 2.765 í mun til árslok 2008. Hóast vøkstur er í haldum, so stendur býtið av marknaðarpørtum millum Føroya Tele og Vodafone nøkulunda í stað. Føroya Tele hevur ein marknaðarpart upp á góð 66 % og Vodafone 34 %.

Nýtslan av sendum MMS-boðum er lítil í Føroyum og hevur verið støðugt lág síðan 2008, Hagtølini vísa, at send vórðu tilsamans 50.800 MMS-boð 1. hálvárið 2007, við árslok 2008 vístu hagtølini góð 15.100 send MMS-boð, og við hálvárslok 2010 er talið skrásett til 15.011.Sum áður upplýst, er ein høvuðsorsøkin til, at brúkarin ikki nýtir MMS-boð tænastuna, at tað ikki ber til at senda MMS-boð ímillum fartelefon hald hjá ávikavist Føroya Tele og Vodafone. Til tess, at tað skal gerast møguligt at senda MMS boð millum kundar hjá ávikavist Føroya Tele og Vodafone, skal ein sambindingaravtala gerast. Eisini er áhugin fyri at nýta MMS-boð minkandi, av tí at nýggj tøkni verður ment og nýggjar tænastur verða bjóðaðar út.

Í seinastu frágreiðing frá Fjarskiftiseftirlitinum varð kunnað um málið viðvíkjandi IMSI nummarrøðini 274-02-9. Málið snúði seg um at Vodafone var veitt nýtslurætt á íslendskum IMSI-nummarrøðini 274-02-9. Hetta hevur m.a. havt við sær at Vodafone FO hevur á minni umsitingarligan hátt hevur fingið atgongd til altjóða reikingaravtalur umvegis Vodafone IS. Føroya Tele metti ikki at Vodafone FO hevði rætt at nýta umrøddu IMSI nummarrøð, umframt at felagið stríddist harðliga ímóti at víðka innanlanda reikingaravtaluna til at fevna um nummarrøðina 274-02-9. Føroya Tele kærdi eisini avgerðina hjá Fjarskiftiseftirlitinum, ið álegði Føroya Tele at víðka reikingaravtaluna, til Vinnukærunevndina. Vinnukærunevndin tók tó ikki avgerð í málinum, tí Føroya Tele tók kæruna aftur í oktober 2009.



### 4.4. Fylgisveinatænastur

Føroyskir fjarskiftisveitarar hava í fleiri ár verið sera frammaliga, tá tað snýr seg um at bjóða tænastur umvegis fylgisvein, t.d. breiðbands- og IP-telefonitænastur til skip. Tílíkar tænastur til skip er til stórt gagn fyri reiðarí, manning og familjur teirra, soleiðis at stóra fjarstøðan, ið ofta er ímillum skipið og land, ikki kennist so stór, so hvørt møguleikarnir at samskifta gerast betri. Í Føroyum eru tríggir veitarar av tænastum umvegis fylgisvein: Teletænastan, FT Samskifti og Vikmar.

### 4.5. Sjóøkið

Tórshavn Radio hevur í 2008 sett í verk eina AIS tænastu.[6] Henda tænasta er knýtt at "MMSI-nummarinum" hjá teimum einstøku skipunum. Í løtuni hava Føroyar fingið tillutað 999 MMSI-nummur, og av teimum verða 600 nýtt. Av tí at væntast kann, at verandi og líknandi tænastur fara at økjast í framtíðini, ætlar Fjarskiftiseftirlitið at søkja altjóða myndugleikar um fleiri nummur.

### 4.6. Kringvarpsvirksemi o.a.

*Útvarp*

Innan útvarp eru tríggjar at kalla landsdekkandi ræsur - Útvarp Føroya, Lindin og Rás2. Í 2007 varð Rás2 seld til Miðlavarpið. Netparturin varð tó ikki seldur við, men varð lagdur í annað felag, Sp/f R-2 NET. Allar ræsurnar senda við analogari tøkni, og í stóran mun ber til at móttaka í stereogóðsku. Hartil sendir ÚF á millumbylgju, ið røkkur kring Føroyar og á norðurhøvum.

*Sjónvarp og fylgisveinasjónvarp*

[6] AIS - Automatic Identity System

Umframt SVF, ið røkkur kring alt landið, eru fleiri sjónvarpskaðalnet knýtt at limum í eigarafeløgum. Konsessiónirnar til eigarafeløgini eru avmarkaðar til kaðalnet til sjónvarp, intra- og internet í avmarkaðum landafrøðiligum øki, t.e. einum býlingi o.tíl.

Televarpið hevur við sínum digitalu jørðsendinet-tænastum (DVB-T ella DTT tænastur) havt eina støðuga útbygging. Í farna ári eru útbyggingar farnar fram í sunnaru helvt av Suðuroynni. Sendinetið hjá Televarpinum røkkur út til uml. 94 % av føroysku húskjunum. Televarpið hevur higartil sent á UHF-kanalum við høgari sendistyrki. Í altjóða høpi er nú gjørt av, at hetta framyvir skal brúkast til mobilt breiðband, og verður Televarpið tískil noytt til at flyta til lægri sendistyrkir. Televarpið er byrja uppá hesar fyrireikingar.

### *4.7. ÚF/SVF sendinetini (Kringvarp Føroya)*

Sendinetini hjá ÚF/SVF hava í fleiri ár verið rikin av Føroya Tele, ið fær eina árliga upphædd til rakstur og viðlíkahald fyri uppgávuna.

Nýggjur millumbylgjusendari varð settur upp í Akrabyrgi fyrst í 2009, umframt at farnu árini eru fleiri sendarar uppsettir, ið hava betra um móttøkugóðskuna á FM-bandinum. Farna árið eru sendarar uppsettir, m.a. í Sundalagnum, Nólsoy og Vágatunnlinum/Vágamegin.

Eisini er nýggjur FM-sendari settur á Sornfellið. Fjarskiftiseftirlitið hevði eina størri viðgerð av hesum loyvi, m.a. tí at eftirlitið rendi seg í nøkur ósamsvarandi áhugamál, m.a. mettu loftferðslumyndugleikarnir, at FM-sendarar á Sornfelli kunnu ávirka ILS-skipanina[7] á flogvøllinum í Vágum, tí innflúgvingarleiðin hjá flogførunum yvir Miðvág liggur tætt við Sornfelli, og innflúgvingarleiðin inn gjøgnum Sørvág er í linju móti Sornfelli. Hóast hetta vórðu viðurskiftini loyst, soleiðis at loyvið kundu gevast til FM-sendaran.

Sum upplýst senda útvarpsrásirnar í Føroyum við analogari tøkni. Fjarskiftiseftirlitið hevur sett kanningar í verk til at meta um, hvat skal til fyri at nýta digitala tøkni (DAB)[8] ístaðin. Heintað verður inn tilfar frá øðrum londum, ið eisini hava nógv fjallalendi eins og Føroyar.

### *4.8. Uttanlandssamskiftistøknir*

Ein sera týðandi fortreyt innan fjarskifti eru samskiftismøguleikarnir við útheimin.

Møguleikarnir fyri uttanlandssamskifti eru hesir:

1. Fylgisveinar
2. Sjókaðalin CANTAT-3
3. Sjókaðalin FARICE-1
4. Sjókaðalin SHEFA-2

FARICE-1 kaðalin varð tikin í nýtslu í 2004. FARICE-kaðalin liggur millum Skotland, Føroyar og Ísland. Umframt FARICE-kaðalin hava Føroyar eisini samband við umheimin umvegis Cantat-3 kaðalin. Cantat-3 kaðalin hevur avmarkaðan kapasitet í mun til FARICE-1 kaðalin. Cantat-3 kaðalin, ið varð tikin í nýtslu í 1994, er gamal, og tað letur til, at hann hevur tænt fyri seg.

[7] ILS - Instrument Landing System
[8] Digital Analog Broadcasting

Í apríl 2008 varð nýggjur sjókaðal, kallaður SHEFA-2, tikin í nýtslu. Eitt dótturfelag hjá Føroya Tele Samtakinum, P/F SHEFA, eigur og rekur nýggja sjókaðalin. Nýggi sjókaðalin liggur millum Føroyar, Hetland, Orknoyggjar og Skotland.

## 5. Treytir og meginreglur

### *5.1. Sambinding og samskipan av fjarskiftiskervum og fjarskiftistænastum*

Sbrt. fjarskiftislógini eru konsessiónshavarar álagdir at geva seg undir ótálmaða sambinding og samskipan av almennum fjarskiftiskervi og almennari fjarskiftistænastu. Um annar konsessiónhavari vil binda fjarskiftiskervið hjá sær upp í fjarskiftiskervið hjá viðkomandi, skulu partarnir gera sáttmála um sambindingina og treytirnar fyri henni.

Føroyska fjarskiftislógin er ein sonevnd rammulóg, t.e., at hon ikki neyvt ásetir, hvørjar tøkniligar sambindingar og samskipanir kunnu fara fram, men lýsir nøkur fyribrigdi, ið síðani skulu metast um, t.d. um tað tøkniliga, umsitingarliga og fíggjarliga letur seg gera.

### *5.2. Prísásetingarmeginreglur*

Á várið 2010 vóru prísásetingarmeginreglurnar broyttar í konsessiónunum hjá Føroya Tele og Vodafone.

Í konsessiónini hjá Føroya Tele var orðingin soljóðandi:

*"Alment um veitingarnar*
*Fjarskiftiseftirlitið hevur eftirlit við, at meginreglurnar verða fylgdar.*



*1. Prísir og gjøld mugu ikki verða kappingaravlagandi og mugu ikki avlaga heildar útreiðslu- og inntøkubygnaðin hjá FT, tvs. ikki er loyvi til at krosssubsidiera til, frá og millum økir við kapping.*
*2. Prísir og gjøld skulu verða gjøgnumskoðiligir og miðast skal eftir veruligum kostnaði + rímuligan vinning í tann mun kapping er á økinum (hetta skal útroknast útfrá ásetingunum í fylgiskjali 2). FT skal hava alment tilgongiligar listaprísir.*
*3. FT fær loyvi til at fremja avsláttraskipanir við almennum treytum. Hesar avsláttarskipanir verða sendar Fjarskiftiseftirlitinum til ummælis og góðkenningar."*

Og núverandi orðing er:
"*Alment um veitingar:*
1. *FT hava alment tilgongiligar og gjøgnumskoðiligar prísir.*
2. *Prísir og gjøld skulu verða í samsvar við galdandi kappingarrætt"*

FSE metir, at tað er rættari, at prísir og avsláttarskipanir til endabrúkarar á fjarskiftisøkinum verða regulerað i vanliga kappingarrættinum og ikki sektorspesifikt í fjarskiftislóggávuni.

Í § 1 í fjarskiftislógini eru endamál lógarinnar ásett. Í serligu viðmerkingunum til greinina stendur m.a., "*at greinin setir upp nøkur stevnumið, sum hildið verður, at ein nýggj lóg um fjarskifti eigur at hava sum karm. Roynt hevur verið at raðfest hesi endamál, uttan at ein tó eigur at leggja annað í hesa raðfesting enn nakrar meginreglur."*

Sum síðsta punkt í § 1, pkt. i) er ásett, at endamálið er *"at skapa fortreytir fyri frælsari kapping á fjarskiftisøkinum."* Ongar serligar viðmerkingar eru til hetta pkt.

Í almennu viðmerkingunum er ásett at, “at av avgerandi týdningi fyri virksemið á fjarskiftisøkinum eru reglurnar um ONP *“Interkonnekt(íbindingaravtalur)...Í stuttum kann sigast, at reglurnar um Interkonnekt skulu tryggja, at tað ber til at knýta fjarskiftiskervi hjá ymsum kerviseigarum saman, og at ONP er heitið fyri tær reglur, sum áseta undir hvørjum treytum, tænastuveitarar kunnu bjóða út tænastur á kervi hjá ymiskum kerviseigarum. Um hesi bæði heiti kann eisini sigast, at tey eru amboð, sum skulu hjálpa til at fremja veruliga kapping í sambandi við, at liberaliserað verður á fjarskiftisøkinum.”*

Í heimildini hjá landsstýrismanninum at veita konsessión til fjarskifti er í § 8, stk. 2 litra g ásett, at verður konsessión veitt, skulu treytir leggjast á viðkomandi um: *viðskiftatreytir, herundir eisini ásetan av gjøldum.* Ongar viðmerkingar eru í lógini, hvussu litra g skal tulkast. Heimildirnar annars í § 8 eru heimildir at áseta nærri treytir við konsessiónsveitan (á engrosniveau), t.e. t.d., at onnur kunnu fáa konsessión til tað sama, krav um sambinding og samskipan av kervum vm.

Prísásetingarmeginreglurnar hava verið sera umsitingarkrevjandi fyri FSE, og sum kappingin millum tænastuveitararnar hevur tikið seg fram, varð mett, at ásetingar ikki vóru nøktandi, og at tað ikki var rætt at víðka um ásetingar við ógreiðu lógarheimildini í fjarskiftislógini. Harumframt fevnir eitt samlað produkt, ið fjarskiftisveitarar bjóða, um meira enn bara fjarskiftistænastur, t.d. telefontól, KT-loysnir vm. og tískil tænir tað neyvan nøkrum endamálið framhaldandi at hava eftirlitsásetingar fyri bara ein part av produktinum.

### *5.3. Veitingarskyldan hjá Føroya Tele*

Sbrt. fylgiskjali 3 í konsessión til Føroya Tele frá 15. apríl 1999 hevur Føroya Tele veitingarskyldu á vanligari fastnetstelefoni (PSTN og ISDN) sbrt. neyvari treytum, ásettar í fylgiskjalinum. Tað er vanligt, at størsti veitarin á einum marknaði verður álagdur eina veitingarskyldu.



Á sama hátt sum meginøkið, hevur útjaðarin í Føroyum sum heild eitt nøktandi útboð av fjarskiftistænastunum, fastneti, uppringdum interneti, fartelefoni og breiðbandi. Tað eru heilt fá búpláss eftir, ið ikki hava møguleika at samskifta umvegis breiðbandið. At byrja at veita nýggjar tænastur, s.s. breiðband, er fyri veitaran ein spurningur um stovningarkostnað í mun til íbúgvaratal og inntøkumetingar.

Føroya Tele er eisini álagt veitingarskyldu til grundleggjandi tænastur fyri deyv. Veitingarskyldan viðvíkjandi tænastum til deyv varð áløgd í 1999, men hesar tænastur eru tøkniliga ikki tíðarhóskandi longur.

### *5.4. Tilbúgvingarviðurskifti*

Í fylgiskjali til konsessiónina er Føroya Tele álagt at røkja serligar uppgávur í sambandi við almennu tilbúgvingarskipanina. Serligu uppgávurnar hava til endamáls at tryggja samfelagstýðandi alment veitt fjarskifti, sum fevnir um fjarskiftiskervið og fjarskiftistænastur. Hetta er neyðugt, tí tað snýr seg um uppgávur, ið hava sum endamál at fyribyrgja, avmarka og veita hjálp í sambandi við skaða á persónar, ognir og umhvørvi, tá vanlukkur, katastrofur og tílíkt henda, ella tá vandi er fyri hesum.

Í konsessiónum veittar øðrum veitarum er sett inn áseting um, at fjarskiftisveitararnir eftir áheitan frá landsstýrismanninum skulu taka lut í almennu tilbúgvingarskipanini.

Føroya Tele er álagt ókeypis at tryggja ráðlegging og at fremja tilbúgving innan fjarskifti viðvíkjandi alarmsentralinum, harundir at røkja og viðlíkahalda 112-vekslaran við tilhoyrandi tól- og ritbúnaði.

Føroya Tele er eisini álagt ókeypis at stovna og røkja serliga leigulinjuskipan. Upprunaliga varð ásett, at leigulinjuskipanin skuldi setast í verk innan 1. september 2005. Av ymiskum orsøkum dró arbeiðið við at seta upp leigulinjur út, og í november 2006 steðgaði arbeiðið upp. Steðgur er framvegis í arbeiðinum.

Onnur tilbúgvingarkrøv, ið eiga at verða tikin upp og viðgjørd, eru t.d. neyðstreymur, vernd av útgerð og bygningum umframt starvsfólkatilbúgving.

**6. Nummarviðurskifti**

Fjarskiftiseftirlitið umsitur einkarrætt landsins til nummartilfeingið. Føroyska nummarskipanin, sum er eitt yvirlit yvir nummur til sertænastur, fastnet, fartelefoni og ymiskar serkotur, er teldutøk og er at finna á heimasíðuni hjá Fjarskiftiseftirlitinum, www.fse.fo.

Í Føroyum hava vit ikki sonevndan nummarportabilitet[9]. Fyri nøkrum árum síðani arbeiddi Fjarskiftiseftirlitið við at kanna hetta evnið, men tá vann tað ikki frama millum veitararnar. Orsøkin var einamest, at mett varð, at stovningarkostnaðurin var ov høgur í mun til brúkaraskaran og í mun til gagnvirðið.

Ein fyribils loysn, ið framvegis verður brúkt, er ein sonevnd CNA-tænasta[10], har ein boðklivi boðar frá nýggja nummarinum hjá felaganum. Fjarskiftisveitarar hava gjørt samstarvsavtalur um hetta.

Sjøtul er tó aftur settur á arbeiði at skipa nummarportabilitet í Føroyum. Dentur verður í fyrstu atløgu lagdur á fartelefonitænasturnar. Settur er ein arbeiðsbólkur við umboðum frá Føroya Tele og Vodafone. Fjarskiftiseftirlitið metir at føroyska fjarskiftislóggávan, manglar reglur, eins og í grannalondum okkara, har fjarskiftisveitarar vera álagdir at tryggja, at endabrúkarar kunnu taka telefonnummarið við sær, um skift verður til annan veitara. Úrslitið er tískil, at arbeiðið at skipa nummarportabilitet als ikki gongur eins skjótt, sum Fjarskiftiseftirlitið metir hóskandi.



**7. Radioeftirlitsvirksemi – tilluting av frekvensum (tíddum), radioprógvum o.a.**

Radioeftirlitsdeildin hevur um hendi umsiting av frekvens(tíddar)- og radioloyvum til:

Bátar / Skip / Flogfør
Radiostøðir á landi
Áhugavarparar

Radioeftirlitsdeildin hevur eftirlit við hesum radiostøðum eins og avlurting (monitering) av tíddum, peiling av radioórógv o.ø.

Deildin umsitur, próvdømir og útskrivar siglinga-radioprróvbrøv til navigatørar.

Gongdin vísir alsamt størri og vaksandi eftirspurning eftir frekvensum í sambandi við frælsgering av fjarskiftinum í Føroyum umframt ein vaksandi eftirspurning eftir siglinga radioprógvbrøvum.

Siglinga-radioprróvbrøvini fevna um:

GOC General Operator's Certificate
LRC Long Range Certificate
ROC Restricted Operator's Certificate
SRC Short Range Certificate

[9] Nummarportabilitetur er ein tænasta, ið merkir, at ein endabrúkari hevur møguleika at flyta sítt telefonnummar frá einum veitara til ein annan

[10] CNA - Changed number announcement

Loyvishavararnir gjalda árligt loyvisgjald, umframt at nøkur próvbrøv skulu endurnýggjast við jøvnum millumbili.

*Loyvi á radioøkinum*

| | Samlað tal pr. 30.06.2010 | Tilgongd/ frágongd í mun til 31.12.2008 |
|---|---|---|
| Bátar og skip | 2397 | +214 |
| Landstøðir | 1546 | +98 |
| MMSI | 736 | +118 |
| Áhugavarparar | 66 | +6 |
| Radiopróvbrøv | 6988 | +95 |

Umframt tilgongd og frágongd av loyvum á radioøkinum er eisini talan um vaksandi kundarøkt á øllum økjum.

Talið av loyvum til bátar og skip hava havt rímuliga tilgongd undanfarin ár. Eitt tal av loyvum uppá uml. 2.400, má sigast at vera sera høgt í mun til fólkatalið, tá vit samanbera okkum við grannalondini.



Tal av loyvum til landsstøðir er økt við 98 loyvum. Tað hevur eisni verið ein vøkstur í radiopróvbrøvum í 2009-2010.

Í 2009 kom samstarv í lag millum Fjarskiftiseftirlitið og Skipaeftirlitið um endurnýggjan av GOC-radioprógvum. Hetta hevur lætt munandi um mannagongdirnar, nú bæði radioprógvini og vinnubrøvini verða endurnýggja samstundis og á sama stað.

Tann 1. november 2010 kom í gildi nýggj kunngerð um nýtslu av radiofrekvensum uttan einstaklingaloyvi, umframt áhugavarparaprógv og kallitekn við meira. Samstundis sum henda kunngerð kom í gildi fóru 2 reglugerðir úr gildi; Reglugerð nr. 3 frá 17.mai 2004 um uppseting, nýtslutøku og brúk av radioútbúnaði í siglinga radiotænastum og loftferðslutænastum við einstaklingaloyvi til frekvensnýtslu (tíddarnýtslu), Reglugerð nr. 4 frá 22.juni 2004 um áhugavarping v.m. og Reglugerð nr. 1 frá 29.september 2006 um alment loyvi til tráðleyst fjarskifti í ávísum frekvensøkjum(tíddarøkjum) úr gildi. Harumframt arbeiðir Fjarskiftiseftirlitið í løtuni við at tillagað verandi frekvensætlan við nýtsluvegleiðingum fyri Føroyar.

## 8. Altjóða og millumtjóða viðurskifti

Í altjóða fjarskiftishøpi eru Føroyar í ITU (International Telecommunication Union) skrásettar sum „territorial administration“ (økisumsiting), og samskifta Føroyar beinleiðis við ITU í ymiskum viðurskiftum.

Fjarskiftiseftirlitið hevur eisini møguleika fyri at luttaka saman við danska IT- og Telestyrelsen og Videnskabsministeriet á fundum o.ø. innan ITU, umframt í øðrum fjarskiftisfelagsskapum.

Fjarskiftiseftirlitið hevur harumframt gott samband og samstarv við fyrisitingarmyndugleikar innan fjarskifti, serliga í Norðurlondum.

Síðani á vári 2006 hevur Fjarskiftiseftirlitið verið føroyskt umboð í GAC (Governmental Advisory Committee) innan ICANN. ICANN er felagsskapurin, ið umsitur eyðmerkingarskipan og protokollir á internetinum. Í Føroyum er tað FO-ráðið, ið umsitur .fo navnaøkið. FO-ráðið hevur eisini GAC atlimaskap.